## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Stormur av landsynningi, seinnapartin upp í skrið av suðri. Stundum regn ella ælingur og hitin millum 6 og 9 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Gul til stívt andøvsgul av landsynningi og eystri og sólglottar, men kanska okkurt ælið. Hitin millum 5 og 8 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Lot til andøvsgul av eystri og landsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 4 og 7 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av suðri og útsynningi og regn av og á. Hitin millum 4 og 8 stig.

# Konsert við myndasýning

**Nýggj framførsla av »Kvartett til tíðarinnan enda« spælir saman við átta málningum, sum Frits Johannesen hevur málað til klassiska høvuðsverkið**



*Musisku málingarnir hjá Frits Johannesen verða nú partur av livandi tónleiki á palli*

KONSERT
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Í kvøld og leygardagin skipar Konsertfelagið fyri tveimum konsertum við einum heilt serstøkum verki, sum Frits Johannessen, listamálari úr Fuglafirði, í hesum døgum málar átta stórar oljumálningar til. Málningarnir verða sýndir fram saman við tónleikinum.

### Hugskot kom av sær sjálvum

Ein dagin fyri nøkrum árum síðan fullu Frits Johannessen og klaverleikarin Jóhannes Andreasen í prát um ta gitnu "Kvartettina til tíðarinnar enda", sum franska tónaskaldið Olivier Messiaen skrivaði í týskari fangalegu undir seinna krígnum. Verkið er eitt av høvuðsverkunum innan klassiskan tónleik í 20. øld, og sum teir prátaðu, kom hugskotið heilt av sær sjálvum at sameina henda tónleikin við myndir.

Tónleikurin er fyri violin, klarinett, sello og klaver, og tað verða framúr dugnaligir tónleikarar, ið fara at framføra hann. Amerikanski klarinettleikarin Lee Morgan er soloklarinett-leikari í Kongaliga Kapellinum í Keypmannhavn, pólski selloleikarin Andrzej Bauer er víðagitin solistur og undirvísir á konservatoriinum í Warshava, violinleikarin Øssur Bæk virkar burturav sum sololeikari, og klaverleikarin Jóhannes Andreasen undirvísir í føroysku musikkskúlaskipanini og hevur drúgvar royndir frá altjóða virksemi.

Konsertirnar við myndasýning verða tann 22. januar kl.20.00 í Mentanarhúsinum í Fuglafirði og tann 24. januar kl.15.30 í Norðurlandahúsinum. Konsertin varir umleið ein tíma.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -13 |
| Nuuk | -7 |
| Qaqortoq | -5 |
| Ammassalik | -9 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | -2 |
| Seyðisfjørður | -2 |
| Tórshavn | 0 |
| Lerwick | 3 |
| Aberdeen | 5 |
| London | 9 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 5 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 5 |
| Keypmannah. | 4 |
| Helsinki | 3 |
| Moskva | -1 |
| Berlin | 0 |
| Warzawa | 0 |
| Kiev | 0 |
| Bukarest | -2 |
| Paris | 5 |
| Madrid | 0 |
| Róm | 10 |
| Malorca | 14 |
| Athen | 14 |
| Malta | 15 |
| Tunis | 14 |
| Beijing | 0 |
| New Dehli | 19 |
| Bangkok | 25 |
| Jakarta | 27 |
| Sydney | -- |
| New York | 4 |
| Miami | 26 |
| Los Angeles | 24 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | 30 |
| La Paz | 7 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 28 |

### LUFTTRÝSTIÐ



**Í gjár:**
Eitt stormlágtrýst, 842 hPa. sunnan fyri Ísland stendur mestsum í stað og dýpist framvegis. Brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum komandi samdøgur.



**Í dag:**
Stormlágtrýstið í útsynning vestan úr Føroyum fer spakuliga norðureftir og brúgvalagið haðani verður verandi yvir Føroyum.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 18/01 kl. 06⁰⁰ – 19/01 06⁰⁰. Hitin í gjár: 5,0°
Minsti hiti máldur í januar: -8,8° - Mesti hiti máldur í januar: 11,6°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 14,0 mm – mált frá 18/01 kl. 06⁰⁰ – 19/01 06⁰⁰.
Avfallið higartil í januar: 163 mm







### VESTFALLSKYRRINDI

18. januar Seinna kvarter
23. januar Mánin longst frá jørðini
26. januar Tendring

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 22 .jan | 3:47 | 16:12 | 2:47 | 15:12 | 3:02 | 15:27 | 5:47 | 18:12 | 6:47 | 19:12 | 2:02 | 14:27 | 1:02 | 13:27 | 4:02 | 16:27 | 5:02 | 17:27 | 3:32 | 15:57 | 4:47 | 17:12 |
| 23 .jan | 4:36 | 17:01 | 3:36 | 16:01 | 3:51 | 16:16 | 6:36 | 19:01 | 7:36 | 20:01 | 2:51 | 15:16 | 1:51 | 14:16 | 4:51 | 17:16 | 5:51 | 18:16 | 4:21 | 16:46 | 5:36 | 18:01 |
| 24 .jan | 5:22 | 17:44 | 4:22 | 16:44 | 4:37 | 16:59 | 7:22 | 19:44 | 8:22 | 20:44 | 3:37 | 15:59 | 2:37 | 14:59 | 5:37 | 17:59 | 6:37 | 18:59 | 5:07 | 17:29 | 6:22 | 18:44 |
| 25 .jan | 6:05 | 18:27 | 5:05 | 17:27 | 5:20 | 17:42 | 8:05 | 20:27 | 9:05 | 21:27 | 4:20 | 16:42 | 3:20 | 15:42 | 6:20 | 18:42 | 7:20 | 19:42 | 5:50 | 18:12 | 7:05 | 19:27 |
| 26 .jan | 6:47 | 19:07 | 5:47 | 18:07 | 6:02 | 18:22 | 8:47 | 21:07 | 9:47 | 22:07 | 5:02 | 17:22 | 4:02 | 16:22 | 7:02 | 19:22 | 8:02 | 20:22 | 6:32 | 18:52 | 7:47 | 20:07 |